# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Finleif Mortensen í Smiðjuni í Lítluvík



Fríggjadagin 27. feb. kl. 16.00 letur ein málningaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Tað er Finleif Mortensen, sum sýnir fram. Várlongsul, sum framsýningin kallast, hevur glaðar, fagrar litir, sum bera brá av at tað skjótt er vár.

Hóast at tað ofta eru tey somu plássini ella tær somu bygdirnar sum ganga aftur sum myndaevni, so gevur tað skiftandi veðurlagi, ljósið og skuggaspæli, millum húsini, eina skiftandi mynd har hús og fjøll gerðast eins og litríkir skulpturar sum skifta skap saman við ljósinum.

Seinastu árini hevur Finleif sýnt fram á gallaríum í Danmark og luttikið á ART-Copenhagen og ART-Herning, sum eru tvær anerkendar kunstmessur í Danmark.

Við á framsýningini í Smiðjuni í Lítluvík eru 24 málningar.

Framsýningin letur upp fríggjadagin kl. 16.00. Opið er til týsdagin 3. mars frá kl. 10 - 19, tó sunnudagin frá kl. 14-19.

## Føroyskt Hetlendskt Vinafelag havt aðalfund

Føroyskt Hetlendskt Vinafelag hevði aðalfund 11. februar 2009. Á skránni var formansfrágreiðing, gjøgnumgongd av roknskapi og nevndarval. Á fundinum varð eisini umrøða av vánaliga ferðasambandinum millum Hetland og Føroyar.

Í nevndini hjá Føroyskt Hetlendskt Vinafelag sita nú Erhard Jacobsen, formaður, Sigrun Joensen, næstformaður, Eyrith Guttesen Leyni, kassameistari, Jóhan Hendrik W. Poulsen og Maria Dalsgarð, nevndarlimir. Julieth Johannesen er eykalimur, og Tryggvi Sondum er grannskoðari.

Nýggja nevndin var samd um at senda skriv til Smyril Line, har felagið harmast, at Norrøna ikki longur leggur inn í Hetlandi. Í skrivinum vísir nevndin á, at tað heilt frá gamlari tíð hevur verið nógv samband millum



*Erhard Jacobsen, formaður í Føroyskt Hetlendskt Vinafelag*

Føroyar og Hetland, bæði politiskt, vinnuligt, ítróttaligt og mentanarligt, og vanliga hevur eisini verið regluligt ferðasamband millum londini bæði. Henda avgerð hjá Smyril Line at taka Hetland úr ferðaskránni ger sítt til at slíta tað góða og gevandi sambandið, sum er millum nógvar føroyingar og hetlendingar. Hetland er ein av okkara grannatjóðum, sum er áhugavert ferðamannaland, við ríkari søgu, náttúru og mentan. Óhugsandi er heldur ikki, at eitt gott ferðasamband kundi verið støði undir meira víðfevndum samstarvi millum londini. Nevndin heitir tí á Smyril Line at umhugsa aftur at gera nakrar ferðir til Hetlands í øllum førum av og á.

Føroyskt Hetlendskt Vinafelag fer til heystar at hava kunnandi fundir um Hetland og sambandið millum Føroyar og Hetland. Ætlanin er so komandi ár at skipa fyri ferðum til Hetlands og kanska eisini at royna at fáa hetlendingar at koma hendanvegin. Felagið fer í hesum sambandi at venda sær til onnur feløg, sum ivaleyst hava áhuga at ferðast í Hetlandi.

Ætlanin er eisini at felagið fær sær heimasíðu við kunnandi tilfari um Hetland og við felagstíðindum.

Føroyskt Hetlendskt Vinafelag vil fegin at meira lív kemur í felagið, og at fleiri fara at fáa áhuga fyri vinalagnum millum føroyingar og hetlendingar.

Nýggir limir kunnu tekna seg hjá formanninum Erhard Jacobsen, tel. 22 73 73 ella við telduposti til erhard@kallnet.fo.



## Sangkvøld í Gøtu

Leygarkvøldið 28. februar verður sangkvøld í Filadelfia í Gøtu.

Jóannes S. Hansen og vinfólk hava skipað fyri nøkrum væleydnaðum sangkvøldum kring landið hesi seinastu árini. Nú er so túrurin komin til Gøtu.

Dentur verður serliga lagdur á góðan felagssang, tó verður høvi at hoyra onkrar solistar inn ímillum, sum kvøldið líður. Aftaná sangin verður kaffi og te og okkurt leskiligt afturvið.

Fyriskipararnir siga frá, at øll eru hjartaliga vælkomin til hesa sangløtuna, ið sum sagt byrjar kl. 19.30 leygarkvøldið komandi.

